LM-136/2020

Fylgiskjal 9.

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

HOYRINGSSVAR FRÁ LANDSBANKANUM TIL UPPSKOT UM LØGTINGSLÓG UM VEIÐIGJØLD FYRI FISKISKAP

Føroyska fiskivinnan er skipað við, at feløg ella einstaklingar fáa veiðirættindi frá landsstýrinum. Nøkur veiðirættindi eru smábýtt, og geva lítið av sær, tí ov nógv skip eru um ov lítið av fiski. Í øðrum førum eru veiðirættindi til sera stóra nøgdir av fiski lutaði út til fá fólk. Í teimum førum, har veiðirættindi til stór náttúrutilfeingi eru lutað út til fá fólk, førir hetta til at tey, sum eiga skipini, fáa yvirskot, ið eru fleiri ferðir so stór, sum yvirskotini í vinnum, sum virka í kapping. Tað stóra yvirnormala yvirskotið verður kallað tilfeingisrenta, tí tað stavar ikki frá vanligum dugnaskapi, men frá tí at ein einstaklingur ella felag hava fingið tillutað rættindi til eitt sera stórt tilfeingi.

Tað er tí ein framíhjárættur at fáa tillutað veiðirættindi, tá fá eru um at býta eitt stórt og virðismikið tilfeingi. Tey, sum fáa henda framíhjárætt, eiga tí at rinda fyri hesi rættindi.

Rætt gjald eigur at vera goldið fyri hesi rættindi. Besti háttur at finna rætta gjaldið, er at seta fiskirættindini til sølu. Keyparin, tað vil siga fiskivinnufyritøkurnar í hesum føri, eiga besta boðið uppá, hvussu nógv virði veiðirættindini hava, tí fyritøkurnar kenna best til vinnuviðurskiftini í vinnuni, og hvønn prís, tær vilja rinda fyri at fáa rættindi at fiska. Hesin leistur er heldur ikki ókendur fyri vinnuna, tí bæði skip og rættindi vera javnan handlað.

Tað er tó ikki politiskur vilji at seta fiskirættindini til sølu. Politisku myndugleikarnir ynskja heldur at áseta eitt veiðigjald fyri veiðirættindi. Veiðigjaldið skal ásetast sum eitt kilogjald fyri hvørt fiskaslag.

Landsbankin tekur undir við, tá uppboðssøla ikki fær undirtøku, so eigur skipanin við veiðigjaldi at vera gjørd so løtt at umsita sum møguligt og at hon er gjøgnumskygd. Ein skipan við kilogjaldið er góð í so máta. Men landsmyndugleikarnir eiga á hvørjum árið, tá árið er farið, at lata ein óheftan stovn gera eina útrokning av, hvat tilfeingisrentan var tað árið – og so seta veiðigjøldini út frá tí, fyri næsta fiskiár. Av tí at hetta verður eitt roknistykki, heldur enn ein søla á einum marknaði, so verður trupult at raka 100% rætt, men fyri at bøta um óvissuna eiga eini 80-90% av roknaðu tilfeingisrentuni at vera tikin inn. Eins og við verandi uppskoti, koma fiskiveiðifyritøkurnar at rinda ov nógv okkurt árið, og ov lítið okkurt annað árið, men hetta fer at javna seg út sæð yvir eitt longri áramál.

Landskassin eigur at taka alla tilfeingisrentuna inn, so vælferðin frá náttúrutilfeinginum kemur øllum borgarum í Føroyum til góðar. Tað er eisini tað sum stendur í tilmælinum um skipan til veiðigjøld undir meginreglur, at æltanin er: *"at gjaldið er gjøgnumskygt og einfalt at umsita, og at gjaldið samsvarar ella onkursvegna stendur mát við virðið á rættindunum".*

Hetta er tó ikki tað sum verður gjørt í uppskotinum. Í uppskotinum verða veiðigjøldini roknað út frá inntøkuni av tilfeingisgjaldinum á landsroknskapinum fyri 2018, nevniliga um 300 mió. kr., uttan yvirhøvir at meta um, um hetta er rætt tilfeingisgjald.

Landsbanki Føroya

Tað eru stór sannlíkindi at tilfeingisgjaldið er sett alt ov lágt. Útrokningar hjá búskaparfrøðingum benda á, at tilfeingisrentan er munandi hægri, at hon heldur er nærri 1 mia. kr.

Lógin ásetur, at veiðigjøldini eru avmarkað til tey fiskasløg, sum í dag hava eitt ásett veiðigjald. Landsbankin er samdur við umboðini fyri fyrisitingina, at skipanin eigur at vera galdandi fyri allan fiskiskap. Tað skal viðmerkjast, at tað neyvan er stórvegis tilfeingisrenta í heimaflotanum, men so eigur landið at miðja ímóti at effektivisera heimaflotan, soleiðis at úrtøkan verður betri og harvið eisini verður møguligt at fáa heimaflotan at geva eitt yvirnormalt avkast.

20.000 tons av makreli verða útlutaðar til heimaflotan. Hetta er beinleiðis stuðul til flotan, pakkaður inn í makrelkvotu. Við at veita henda stuðul, verður tillagingin, sum eigur at fara fram í heimaflotanum, drigin út, og er tað ikki skilagott búskaparliga.

Um skipanin verður sett í gildi, er neyðugt javnan at eftirkanna, um prísirnir, ið nýttir verða til at áseta veiðigjaldið eru í samsvari við marknaðarprísir á fiskaslagnum.